Fundur um Vágatunnilin í Sørvágs skúla

Hóskvøldið skipar Vága Vinnufelag fyri almennum fundi, har Gisli Gislason, borgarstjóri á Akranesi, fer at halda fyrilestur um týdningin av undirsjóvartunli

Gisli Gislason hevur fyrr hildið fyrilestur í Klaksvík um sama evnið

UNDIRSJÓVARTUNNIL
Tíðindaskriv frá Vága Vinnufelag

Sum liður í fyrireikingini til at Vágatunnilin verður opin fyri almennari ferðslu 26. november í ár, skipar vinnan í Vágum fyri almennum fundi í Sørvágs skúla 19. september kl.19. Íslendingurin Gisli Gislason fer at halda ein fyrilestur um tíðina undan og eftir at undirsjóvartunnilin um Hvalfjørðin var tikin í nýtslu.

Gisli Gislason, sum er borgarstjóri á Akranesi, er ikki ókendur í Føroyum. Hann hevur ísamband við vinarbýarsambandið ímillum Akranes og Sørvág verið á vitjan her. Og eisini hevur hann havt fyrilestur í Klaksvík um sama evnið.

Ætlanin við fundinum er at kunna vágafólk og vinnulívið í Vágum um, hvørja ávirkan undirsjóvartunnilin undir Hvalfjørðin hevur havt fyri fólkið og vinnulívið á Akranesi.

Á hendan hátt vónar vinnan í Vágum, at fundurin kann geva íblástur til felagstiltøk ímillum vinnurekandi í Vágum og vágafólk annars.

[illegible]			
Kr. 350,00	Tilmelding tlf. 31 75 97 Hóskvøld 19.30 – 21.10	Maria Ellefsen	Læraraskúlin
	[illegible] byrjar 6. nov		
Kr. 350,00	Tilmelding [illegible] 22 63 37 Mikukvøld 19.30 – 21.10	Marek Mir-Mackiewicz	Venjingarskúlin
Føroys[illegible]			
Kr. 570,00	Tilmelding tlf. 31 79 92 Mánakvøld 18.15 – 20.50	Eyðun á Borg	Venjingarskúlin stova 72
Kr. 470,00	Tilmelding tlf. 31 79 92 Tuesday 18.00 – 19.50	Eyðun á Borg	Venjingarskúlin stova 72
Kr. 470,00 / Kr. 470,00	Tilmelding tlf. 31 73 50 Mánakvøld 18.00 – 19.40 / Mánakvøld 20.00 – 21.40	Regin av Steinum / -	Venjingarskúlin stova 72 / -
Kr. 570,00	Tilmelding tlf. 31 51 39 Mikukvøld 19.00 – 21.35	Jóhanna Traustadóttir	Venjingarskúlin
Kr. 470,00	Tilmelding tlf. 31 77 55 Týskvøld 19.00 – 20.40	Sharon Christiansen	Kommunuskúlin st. 105
Kr. 470,00	Tilmelding tlf. 31 47 66 Mikukvøld 18.00 – 19.40	Arngerð Joensen	Kommunuskúlin st. 104
Kr. 470,00	Tilmelding tlf. 31 47 66 Mikukvøld 19.50 – 21.20	Arngerð Joensen	-
Kr. 470,00	Tilmelding tlf. 31 77 55 Mikukvøld 18.00 – 19.40	Sharon Christiansen	Kommunuskúlin st. 105
Kr. 470,00	Tilmelding tlf. 31 77 55 Mikukvøld 19.50 – 21.30	Sharon Christiansen	Kommunuskúlin st. 105
Kr. 470,00	Tilmelding tlf. 31 16 92 - tlf. 31 84 64 Mikukvøld 19.00 – 20.40	Kristianna Winther Poulsen	Kommunuskúlin st. 102
Kr. 470,00	Tilmelding tlf. 31 51 52 Týskvøld 19.00 – 20.40	Mark Jimenez	Kommunuskúlin st. 101
Kr. 470,00	Týskvøld 20.50 – 22.30	-	-
Kr. 470,00	Tilmelding tlf. 31 23 78 Mikukvøld 19.00 – 22.30	Bozena Rasmussen	Kommunuskúlin st. 101
Kr. 300,00	[illegible] - byrjar 30. sept. Tilmelding tlf. 32 17 02 Mánadag 17.30 – 21.00	Lisbeth G. Petersen	Skúlin á Trøðni
Kr. 300,00	Tilmelding tlf. 31 75 60 Mánakvøld 19.00 – 20.40	Arnold Eyvindsson	Skúlin á Trøðni
Kr. 300,00	- byrjar 2. okt. Tilmelding tlf. 42 15 80 Hósdag 16.00 – 18.35	Anne Grete Harlou	Eystuskúlin
Kr. 300,00	Tilmelding tlf. 31 92 70 Mánakvøld 19.30 – 21.15	Jákup Jóanesarson	Komm. niðara høll
Kr. 300,00	Tilmelding tlf. 31 75 79 og tlf. 21 67 60 Hósdag 16.30 – 18.00	Dan Lamhauge og Sonny Djurhuus	Læraraskúlin
Kr. 300,00 / Kr. 300,00	Tilmelding tlf. 31 77 55 Mikudag 16.00 – 17.30 / Hósdag 14.00 – 17.40	Annika Højgaard / Brandur Øssursson og Annika Højgaard	Skansastova / -
[illegible]			
	Tilmelding tlf. 22 08 57 Hóskvøld 19.00 – 22.05	Leif Hansen	Kommunuskúlin
	Tilmelding tlf. 31 70 39 Mikukvøld 19.30 – 22.05	Palli Hansen	Læraraskúlin
	Tilmelding tlf. 31 18 19 Hóskvøld 19.30 – 22.30	Óluvur Hátún	Sankta Frans Skúli
Kr. 420,00	- byrjar 1. okt. Tilmelding tlf. 21 44 33 Týs. Hósd. 13.30 – 20.00	Ann Kristin Nilsson	Læraraskúlin
Kr. 420,00	Tilmelding tlf. 22 08 57 Týs, mik, og fríggjadag	Leif Hansen	
Kr. 420,00	Tilmelding tlf. 25 46 21 - tlf. 31 77 55 mán, hós 18.00 – 21.00	Katja Volovelskaja	Frúutrøð 1
Kr. 420,00	Tilmelding tlf. 31 48 15 - tlf. 31 77 55 mánadag 16.30 – 18.10	Sharon Weiss	Listaskúlin
	Tilmelding tlf. 31 46 73 Mánakvøld 18.00 – 19.00	Kenneth Jones	Frúutrøð 1
	Tilmelding tlf. 31 46 73 Mánakvøld 19.30 – 22.05 / Hóskvøld 19.00 – 21.35	Ove Olsen	Skansin / -
	Tilmelding tlf. 32 19 61 Mánakvøld 19.15 – 21.45 / Hóskvøld 19.00 – 22.35	Martin Mourisen / Kenneth Jones og Andrea Heindriksdóttir	Frúutrøð 1
Kr. 420,00	Tilmelding tlf. 31 79 74 Mánadag 16.30 – 22.20	Niels Olsen	Kommunuskúlin st. 5
Kr. 420,00	Tilmelding tlf. 31 97 48	Kanny Sambleben	Kommunuskúlin
Kr. 420,00	Tilmelding tlf. 31 86 22 og tlf. 31 51 21 Týskvøld 19.00 – 21.35	Brandur Øssursson	Skansastova
Kr. 420,00	Tilmelding tlf. 21 61 22 Mán, týs,mik,hós. og frí.	Karl Anton Klein	Sankta Frans Skúli
Kr. 420,00	Tilmelding tlf. 31 63 32 og tlf. 22 21 32 Mánakvøld 19.00 – 22.00	Hjalmar Holm	Skansastova
Kr. 420,00 / Kr. 420,00	Tilmelding tlf. 22 76 77 Týskvøld 18.00 – 21.00 / Hóskvøld 18.00 – 21.00	Mikkjal Hvannastein / -	Skansastova / -

Tunlarnir verða klárir til tíðina

Vágafólki nýtist ikki at óttast fyri, at tunlarnir til og í oynni ikki verða klárir til ásetta tíð, sigur landsverkfrøðingurin

TUNNILSGERÐ
Edvard Joensen

Hóast trygdarútgerðin, sum krevst í samband við undirsjóvartunnilin, enn ikki er fingin til vega, væntar landsverkfrøðingurin, at tunnilin kann latast upp til ásetta tíð.

Oyvindur Brimnes vísir á, at tað tosað verður um so og so langa veitingartíð fyri trygdarútgerðina til Vágatunnilin, verður vanliga tosað um spildurnýggja útgerð.

– Men nú er eingin, sum sigur, at tað skal vera nøkur treyt, at útgerðin er spildurnýggj. Tað ber væl til at nýta brúkta útgerð. Bæði bilar og annað. Og ivaleyst ber eisini til at fáa hendur á henni til ta tíð, ásett er, at Vágatunnilin skal latast upp, sigur landsverkfrøðingurin, sum persónliga sigur seg vænta, at tann 26. november klokkan 11.00 verður Vágatunnilin latin upp.

Í hinum endanum av Vágum er eisini ein tunnilsgerð í gongd. Nevniliga í Gásadalstunlinum.

Har raktu teir ein leka fríggjadagin í seinastu viku. Og tað kann henda, at hann fer at seinka arbeiðinum eitt lítið sindur, helur landsverkfrøðingurin.

– Men ikki naka nevnivert, heldur hann, og ivast ikki í, at komið verður ígjøgnum í hesum árinum. Tann størsti trupulleikin, hesin leki hevði við sær, var, at neyðugt var at fáa eina størri pumpu at taka vatnið út úr tunlinum. Ikki var tað meira enn so, sigur landsverkfrøðingurin.

Teir bora í løtuni í tveimum skiftum í Gásadalstunlinum, og eru komnir væl um helvtina, soleiðis at nú hellir niður aftur móti Gásadali. Tí verður vatnið standandi sum ein hylur fyri teimum, alla tíðina, meðan arbeitt verður. Men tá komið er ígjøgnum, verður tað eingin trupulleiki meira, tí tá rennur vatnið út út tunlinum.

Tað gongur væl at bora inni í Gásadalstunlinum. Ein lítil leki darvar ikki arbeiðinum, og komið verður ígjøgnum í hesum árinum, sigur landsverkfrøðingurin

Eingin føroyskur tunnil lýkur ásettu trygdarkrøvini

Eingin av føroysku tunlunum lýkur tey trygdarkrøv, sum í dag eru galdandi. Arbeitt verður upp á at bøta um hetta, og avgjørt er at byrja við teimum nýggju tunlunum og teimum, sum verða umvældir.

TUNNILSTRYGD
Edvard Joensen

Eingin av verandi føroysku tunlunum lýkur tey trygdarkrøv, sett verða til tunlar. Men ein ætlan er løgd fyri, hvussu krøvini skulu uppfyllast. Byrjað verður við teimum nýggju tunlunum, og síðan koma teir eldru, so hvørt teir verða umvældir, sigur Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðingur

Hóast tað á pappírinum púra einki stendur til við tunnilstrygdini í Føroyum, er tað tryggari at koyra í gjøgnum føroysku tunlarnar, enn tað er at koyra á føroysku vegunum, sigur landsvekfrøðingurin.

Nú komið er fram, at Vágatunnilin kanska verður seinkaður orsakað av manglandi trygdarútgerð, verður spurningur eisini settur við, hvussu til stendur í øllum hinum tunlunum í Føroyum.

Til tað svarar Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðinguri, stutt og greitt, at eingin teirra lýkur tey ásettu trygdarkrøvini.

Tað ljóðar beinanveg ógvusligt, og tí verður spurt, um teir so ikki verða stongdir við brestin.

Men so verður ikki, sigur landsverkfrøðingurin. Tí so vandamiklir eru teir kortini ikki,

– Í grundini er tað tryggari at koyra í føroysku tunlunum, enn tað er at koyra á vegunum, sigur hann.

Teir nýggju fyrst

Grundin til, at hesi krøvini nú verða sett Vágatunlinum, er, at gjørt er av, at galdandi trygdarreglur skulu lúkast av øllum føroyskum tunlum. Og avgjørt er eisini at byrja við teimum nýggju og síðan taka teir verandi, so hvørt umvælt verður ymsastaðni.

Vágatunnilin verður so tann fyrsti, sum nýggju trygdarkrøvini raka, og síðan koma Gásadalstunnilin og Norðskálatunnilin, sigur landsverkfrøðingurin. Gásadalstunnilin, ti hann eisini er nýggjur og ikki letur upp, fyrrenn øll krøvini eru uppfylt, og Norðskálatunnilin, tí hann verður umvældur frá botni av, so at siga.

– Men talan verður ikki um at steingja nakran tunnil orsakað av manglandi trygdarútgerð, sigur Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðingur.

Sama støðan er galdandi í Noreg, sum vit hyggja nógv at, tá tosað verður um tunlar og tunnilstrygd í Føroyum. Har eru eisini heilt nógvir tunlar, sum ikki lúka galdandi trygdarkrøv, vísir landsverkfrøðingurin á.

Hann ásannar, at tað hevur ikki verið gjørt so nógv burtur úr trygdini, tí eingin orsøk, so at siga, hevur verið til tess. Tað hevur gingið fint, og so leingi einki hendir, er eingin, sum hugsar um slíkt.

Tað kemur nokk

– Soleiðis er tað vanliga, sigur Oyvindur Brimnes og vísir til Estoniu vanlukkuna. Aftan á hana skuldi knappliga bæði eitt og annað gerast við ferjurnar. Bøgportrini vórðu sveisað aftur og so framvegis.

Tunlar tosaði eingin um soleiðis, fyrr enn tann stóra vanlukkan hendi niðri í Alpunum. Tá varð farið at hyggja at, hvussu til stóð við tunlunum kring heimin, og ásannað varð skjótt, at tað stóð einki til nógvastaðni, vísir landsverkfrøðingurin á.

Um føroysku tunlarnar sigur hann, tunnilin millum Kaldbaksbotn og Signabø ivaleyst er tann tryggasti, vit hava í dag, men hann lýkur heldur ikki øll av teimum krøvum, sett verða.

Væl hevur Tórshavnar Kommuna at kalla alla ta trygdarútgerð, sum finst í dag, men inni í tunlinum mangla bæði eldsløkkjarar og telefon, vísir landsverkfrøðingurin á.

– Tað kann vera gott nokk at hava útgerðina uttanfyri, men tað er í grundini inni í tunlinum, hon eigur at vera. Tí ofta hevur tað víst seg, at tá brandmenninir koma fram, er ov seint, hóast teir bera heilt skjótt at, sigur Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðingurin.